# Rumsfeld vísti til Bibliúna



Fyrrverandi amerikanski verjumálaráðharrin Donald Rumsfeld vísti ofta til Bíbliuna, tá stjórnin hjá George W. Bush, forseta umrøddi Ísrael og viðurskiftini í Miðeystri. Tað skrivar tíðarritið GQ, sum eisini veit at siga, at Rumsfeld plagdi at hava myndir av amerikonskum hermonnum við sær á fund í stjórnini, og at hann ofta skrivaði tekstir til myndirnar við beinleiðis tilvísing til Bíbliuna. Frá vælvitandi keldum hevur GQ fingið at vita, at fleiri embætismenn í Bush-stjórnini vóru illa við av Bíbliu-nýtsluni hjá Rumsfeld, og at teir stúrdu fyri, at almenningurin skuldi fáa frænir av tí. Eitt nú hevði tað verið óheppið, um tað kom fram, tá fjølmiðlarnir avdúkaðu fangaviðferðina í Abu Ghreib, skrivar GQ.

# Spennandi roynd at veiða lakssild í føroyskum sjógvi




**Lakssild fæst í trolið, um hon er til steðar, men royndirnar vísa, at hetta er ein fiskur, sum ikki kann rekast, men glúpast. Royndir hjá íslendingum eru, at lakssild verður ávirkað av veðri, har hon spjaðist í vánaligum líkindum og savnast ikki aftur fyrr enn ein dag eftir, at veðrið er batnað aftur**

LAKSSILD

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nóta-og trolskipið Finnur Fríðu hjá Vinnuni í Gøtu gjørdi fyrr í ár royndir at veiða eftir lakssild, og í vikuni er frágreiðing løgd út á heimasíðuna hjá Havstovuni um hesar royndir.

Vit hava hugt í hesa frágreiðing, sum sjálvsagt hevur áhuga – ikki minst, nú svartkjaftakvotan er lítil, og roynt verður at finna gongdar leiðir til tess at fylla upp í mistu svartkjaftakvotuni, bæði hjá skipum og virki, ið veiða og virka pelagisk fiskasløg.

## Smáur fiskur

Sosialurin hevur hugt eitt sindur at, hvat lakssild er. Onkur heldur kanska, at lakssild er tað sama sum prikkafiskur, men so er ikki. Lakssild er ikki beint í ætt við prikkafisk, men livir nakað sum hesin fiskur. Vanligt er, at prikkafiskur gjarna er ovari í sjónum enn lakssild. Ella taka vit saman um svartkjaft, sum er nógv størri fiskur, prikkafisk og lakssild, so heldur prikkafiskurin sær vanliga ovast í sjónum, síðan kemur svartkjafturin og at enda lakssildin, sum heldur sær niðast í sjónum.

Um náttina koma nógv pelagisk fiskasløg vanliga upp í sjógvin, og tey kunnu koma heilt uppundir vatnskorpuna.

Lakssild er smáur fiskur, í mesta lagi 7-8 sentimetrar til longdar og er kynsbúgvin longu sum eitt ára gamal. Fiskurin hevur ikki verið veiddur vinnuliga um okkara leiðir, men seinastu mánaðirnar hava íslendsk skip fingið væl av hesum fiski í teirra sjógvi. Veiðan hjá íslendsku skipunum hevur verið um 100 tons um døgnið, men um náttina hevur einki verið at fingið.

Á veg aftur av túri um hálvan februar í ár gjørdi nóta-og trolskipið Finnur Fríði tvey hál norður úr Fugloynni við smámeskaðum posa og fekk 60 tons av lakssild. Umborð á skipinum mettu teir, at um broytingar høvdu verið gjørdar við trolinum, hevði tað riggað betri til veiði eftir lakssild. Tá skipið fór útaftur at fiska, vórðu smærri meskar settir í trolið, eins og útgerð var við til at filma og máta gjøgnumstreym í trolinum.

## Best eystanfyri

Fólk vóru nú við frá Havstovuni, eins og trolvirkið Vónin hevði trolkøn fólk umborð á Finnu Fríða.

Leitað varð sera víða, heilt av Fugloyarbanka og vestur á Reykjanesryggin, men lítið var at síggja. Frægast var tó at síggja eystur úr Fugloynni, og har hevði skipið eisini frægastu veiðina.

Tilsamans hevði Finnur Fríði fimm hál, trý í ein landnyrðing úr Fugloynni, eitt suður av Føroyabanka og eitt á Reykjanesrygginum.

Fiskiskapurin var um 100 tons, harav tað mesta varð fingið í tveimum hálum í ein landnyrðing úr Fugloynni.

Á túrunum vórðu bæði undirsjóvarupptøkur og streymmátingar gjørdar í trolinum. Upptøkurnar vístu eitt nú, at lakssildin svimur í ovara parti á bellinum, og at gjøgnumstreymurin í trolinum er vánaligur, um netið frammanfyri posan – millumstykkið – er ov langt og smalt.

Kanningarnar umborð á Finni Fríði vístu, at lakssildin er ovarlaga í trolinum, og hetta samsvarar væl við eygleiðingarnar á dekkinum. Ofta stóð nógvur fiskur stungin í yvirnetið, meðan lítið og einki var stungið í undirnetið.

Hvussu trolreiðskapurin annars var samansettur undir hesi veiði, kann lesast nærri á heimasíðuni hjá Havstovuni, www.hav.fo

## Avmarkað øki

Sum áður nevnt í hesi grein, leitaði Finnur Fríði rættiliga víða, men sera lítið var at síggja, harav leiðin í ein landnyrðing úr Fugloynni royndist frægast.

Frægasta royndin var á 170-210 favna dýpi.

Fiskað varð mest um dagin, men Finnur Fríði hevði eisini eitt tóv sunnanfyri Føroyabanka um náttina.

Havstovan kemur í sínari frágreiðing eftir, at royndirnar hjá bæði íslendingum og føroyingum vísa, at lakssild heldur til í avmarkaðum økjum, sum eru umleið 15 fjórðingar til víddar.

Síðan íslendingar byrjaðu at byrjaðu at fiska, hevur fiskurin flutt seg suðureftir. Fyrst í mars vóru íslendsku skipini einar 30 fjórðingar úr markinum móti altjóða sjógvi suðureftir. Stutt eftir góvust tey at fiska, tí fiskiskapurin minkaði.

Havstovan veit eisini at siga, at onnur føroysk skip, eitt nú Fagraberg og Tróndur í Gøtu, hava eisini leitað eftir lakssild, harav Fagraberg hevði eitt hál á leiðunum við Reykjanesryggin, har teir fingu nakað av lakssild.

Royndirnar hjá Finni Fríða tey fimm hálini, sum skipið hevði, góvu ávikavist



*Lakssild er smáur fiskur, í mesta lagi einar 7-8 sentimetrar til longdar*

*Mynd: Havstovan*